

## Avgerandi svimjistevna

Um vikuskiftið er avgerandi úttøkustevna í svimjing í Klaksvík, har avgerðin fellur um, hvørjir svimjarar sleppa við til flestu av stóru landsliðsuppgávunum í næstum. Talan er um World Cup í Berlin 15.-16. november, landsdystin Føroyar-Ísland í Havn 28. november, NJM í Bergen 5.-6. desember, EM á stuttgeil í Istanbul 10.-13. desember og venjingarlegu og Reykjavík International 8. til 18. januar. Krøvini eru ymisk frá stevnu til stevnu, og hóparnir verða tí ikki teir somu, sum fara til øll hesi tiltøk. Kappingarnar í morgin byrja klokkan 10 og 16, og sunnudagin verður kappast klokkan 9 og 14.30.

# Alt málið er skelkandi

**– Málið um atgongumerkini er eitt, men tað, sum verri er, er at vit ikki eru kunnaðir, hvørki eg ella starvsnevndin annars, og tað er eitt álitisbrot av dimensjónum. At tað ber til at fjala, at aðalskrivarin hevur havt eitt mál koyrandi við UEFA, er sera skelkandi, sigur Høgni í Stórustovu, forseti í Fótbóltssambandinum**

Forsetin í Fótbóltssambandinum ásannar, at uppgávubýtið í Fótbóltssambandinum er ein trupulleiki, nú Ísak Mikladal-málið hevur stungið seg upp. Serliga finst Høgni í Stórustovu at, at starvsnevndarlimir geva aðalskrivaranum ov stórt vald.

– Eg eri valdur av aðalfundinum at umboða tann politiska partin, men umstøðurnar eru sera truplar hjá mær, tí valdið er læst fast í lummanum á aðalskrivaranum. Somuleiðis hevur ein stórur partur av starvsnevndarlimunum parkerað sítt vald í lummanum á aðalskrivaranum. Loyaliteturin hjá okkum sum nevndarlimum eigur sjálvandi at liggja í teimum endamálum, felagsskapurin hevur, segði FSF-forsetin í samrøðu við Rás 2 í gjár.

– Grundleggjandi hevur tað verið ein trupulleiki, at »rollubýtið« er ógreitt. Eg eri sum forseti valdur at umboða allan fótbóltin, men tað er kanska torført at koma inn í ein gamlan felagsskap, har man er vanur at gera tingini, sum man altíð hevur gjørt tey. Men eg taki mína uppgávu í størsta álvara, og tí kann eg ikki góðtaka nakrar sniðgøtur. Tá eg komi fram til, at tingini ikki eru í lagi, noyðist eg at reagera upp á tað.



**– Ein stórur partur av starvsnevndarlimunum parkerað sítt vald í lummanum á aðalskrivaranum, sigur forsetin í Fótbóltssambandinum, Høgni í Stórustovu**

Mynd: Álvur Haraldsen

### Alt málið fjalt

Høgni í Stórustovu vísir á, at spenta støðan í Fótbóltssambandinum í løtuni ikki bara snýr seg um sjálvt málið um atgongumerkjasøluna hjá aðalskrivaranum, men minst líka nógv um, hvussu ein stórur partur av starvsnevndini hevur valt at taklað málið, nú tað er komið fram.

– Tað ringasta er, er at vit ikki eru kunnaðir, hvørki eg ella starvsnevndin annars, og tað er eitt álitisbrot av dimensjónum. At tað ber til at fjala, at aðalskrivarin hevur havt eitt mál koyrandi við UEFA, er sera skelkandi, sigur FSF-forsetin, ið kennir seg hjálparleysan, tá hann ikki fær møguleika til veruliga at seta seg inn í málið um atgongumerkini, Ísak Mikladal seldi ukrainsku ferðaskrivstovuni Sport Line Travel.

– Eg havi ikki fingið øll skjølini í málinum enn, men tann 5. mai hevur aðalskrivarin sent UEFA eitt bræv, har hann meldar seg sjálvan fyri at hava selt atgongumerkini. Ein trupulleiki er, at eg ikki má síggja brævið, sum Ísak hevur sent UEFA, men eg má síggja og fáa at vita, hvat er sagt og skrivað mótvegis UEFA.

Í hesum sambandi vísir Høgni í Stórustovu á, at beinanvegin sum hann var valdur til forseta í Fótbóltssambandinum, hevði hann ein fund við aðalskrivaran, har hann staðfesti, at yvir fyri sær hevði aðalskrivarin eina objektiva upplýsingarskyldu, eina sannleikaskyldu og eina loyalitetsskyldu, sum mátti og skuldi haldast fram um alt.

### Skuldi einki kosta

Meirilutin í starvsnevndini hevur ført fram, at málið um atgongumerkini longu er viðgjørt á fundi í starvsnevndini, og at tá hevði eingin nakran spurning ella nakra viðmerking til nakað. Men Høgni í Stórustovu vísir aftur, at talan hevur verið um nakra viðgerð, og í staðin vísir hann til »bleytu orðingina« í fundarfrásøgnini, har bara fimm orð vísa til nevnda mál: »Umbøn um atgongumerki frá Ukraina«.

– Við neyð kundi meirilutin av starvsnevndini á fundinum týsdagin ganga við til, at vit góvu Ísaki eina ávaring, sum tó skuldi vera loynilig og uttan nakrar avleiðingar, og afturfyri skuldu teir so traðka í karakter og vísa rygg til at geva formanninum arbeiðsumstøður, sigur FSF-forsetin, ið eftir tann fundin ikki sá sær aðrar møguleikar enn at spæla bóltin yvir til feløgini, sum eiga Fótbóltssambandið og eru hægsti myndugleiki í felagsskapinum, tá tað kemur til skarpskeringar.

– Tað er ómetaliga keðiligt, at eg eri noyddur at venda mær til UEFA at greiða teimum frá, at tey brøv, ið verða send Fótbóltssambandinum, hvørki enda hjá mær ella starvsnevndini, tí veruleikin er, at Ísak Mikladal hevur dult hetta málið fyri mær og starvsnevndini. Men er galið í okkara egnu starvsnevnd, so havi eg tó álit á, at eg kann greiða feløgunum frá støðuni. So er tað upp til tey at gera av, um tey vilja hava eina nikkidukku sum formann ella ikki.